gult cyan magenta svart




# Ford Puma



Fyrr kr. 202.000,-

149.995,-
JUBILEUMSPRÍSUR

Ford P/f Wenzel Ford

við Velbastaðvegin • Box 3043 • 110 Tórshavn • www.wenzel.fo

Sosialurin - 311820



InoculateIT
virus-skannari
Kr:875,-



HP OfficeJet G85
Printari
Skannari
Fax
Kopi
Kr: 8.125,-

COM-DATA P/F
www.com-data.fo



## Ársaðalfundur Sp/F Húsið

Sp/f Húsið hevur ársaðalfund á Argjavegi 26 mánadagin 18. september kl. 17.

Skrá sambært lógum felagsins.

Sp/F Húsið





## Skorsteins-sóparin

er við til at halda umhvørvið reint

Jimex Brenniovnar
Isokern Skorsteinsbjálving
Isokern Skorsteinselementir
Lúkur - Fuglaristir
Ventilar - Roykhattar

**Andrass á Krossbrekku**
Skúlagerði - 430 Hvalvík
tel +298 422456
far+ 298 286458
fax + 298 422458
andrass@post.olivant.fo
heima.olivant.fo/-andrass



## Sig okkum frá



Hendir okkurt, sum er áhugvert hjá øðrum at vita, eru vit til reiðar at bera tíðindini víðari.

Sosialurin leggur seg eftir at bera tíðindi úr øllum landinum.

Vit koyra runt í tí kenda, gráa Toyota bilinum við eyðkendu frámerkjunum.

Ferðandi blaðstjórnin er dagliga úti kring landið. Vit eru at hitta á telefon nr. 31 18 20. Telefax nr. 31 47 20.

Edvard Joensen mannar í løtuni ferðandi blaðstjórnina. Hann er at hitta á telefon nr. 42 36 17 ella á fartelefon nr. 22 05 07. Eisini ber til at senda teldupost til:

edvard@sosialurin.fo
ella post@sosialurin.fo

Tíðindablaðið sosialurin



# Keyp myndir

Nú er møguleiki at keypa myndir sum standa í Sosialinum





**Kostnaður pr. stk. fyri litmynd:**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 10x15 cm. | kr. 80,- | 18x24 cm. | kr. 150,- |
| 13x18 cm. | kr. 100,- | 20x30 cm. | kr. 200,- |
| 15x21 cm. | kr. 130,- | 30x45 cm. | kr. 350,- |

Fyll henda lepan út.
Klipp myndina út og send hana saman við lepanum til Sosialin.

**Tíðindablaðið**
**Sosialurin**
**Box 76**
**110 Tórshavn**

Blað nr.: ____
Síða: ____
Stødd: ____
Mongd: ____

Navn: ____
Bústaður: ____
____
Telefon: ____



## Fartelefon

*Siemens C25*



Prísur v/MVG **Kr. 1.495,-**

SpF Teldu Tænastan
Telefon 317620 - www.tt.fo



# Stóra bringu

## -ella lítla?



**Visti tú at 80% av øllum kvinnum ganga í skeivari BH-stødd?**

**Vælkomin inn á gólvið hjá okkum og vit hjálpa og vegleiða tær at finna júst tína stødd. Ring til okkum og avtala tíð.**

**Vit hava BH í støddum úr 65 til 110 cm. í ummáli, og frá AA til H skál.**

**Vit hava eisini korsilett í stórum støddum**

siri
lív & heilsa

Dr. Jacobsensgøta 18 • 100 Tórshavn • Tel./Fax 316610

Sosialurin - 311820



**Norðurlandahúsið í Føroyum**

*Sí SVF tekstvarp s. 650*



## Robustar blandimaskinur

- Tvangsblandarir 38–800 ltr.
- Blandimaskinur 130 – 180 ltr.
- Breitt úrval av stav og bjálka-vibratorum

**Fáast við el, bensin ella dieselmotori**

*Tosið við okkum!*

Kaj Andreasen & Co
Sandvíkarhjalli
Tel. 315600 - Fax 318008

Sosialurin - 311820



## Reyði krossur Føroya

Sorgarlinjan hjá Reyða Krossi Føroya svarar mánad., mikud. og fríggjad. frá kl. $19^{00}$ til $21^{00}$

☎ 212380


*Halt* **sosialin**

gult cyan magenta svart



# Grava vegin upp

*Vegurin heim gjøgnum bygdina í Sandavági verður grivin upp og lagdur av nýggjum sum liður í fríðkanini av bygdini*

EDVARD JOENSEN

**Sandavágur:** Í Sandavági hevur nógv verið gjørt við at fríðka um bygdina seinnu tíðina. Arbeiðið er komið væl ávegis.

Sandavágur varð í 1997 kosin best hildna bygd í Føroyum. Og síðan hevur nógv verið gjørt fyri at fríðka enn meira um bygdina.

Øll kloakkveitingin er savnað í eina stóra høvuðskloakk. Somuleiðis er vatnveitingin løgd av nýggjum.

Hetta krevur nógvan grevstur. Og tá liðugt er, skal alt leggjast aftur, sum rímiligt er. Sandavágs Kommuna hevur so valt at leggja flísar eftir gongubreytunum í parti av bygdini, eins og nýggj gøtuljós eru sett upp fram við vegnum.

Sum arbeiðinum líður, verður eisini komið hagar til, at vegurin skal asfalterast. Men her møtti ein óvæntað útreiðsla kommunukassanum.

Gamli vegurin heim gjøgnum bygdina vísti seg at vera lagdur beinleiðis niður á mold. Einki var grivið ella steinsett, tá hann varð lagdur av fyrstan tíð. Við tíðini eru fleiri løg av asfalti løgd oman á vegin so við og við. Og hesi asfaltløgini hava so at siga hildið vegnum saman.

Nú er, sum skrivað stendur, einki petti skilagott at byggja uttan á fastan botn.



Og tað fingu sandavágsfólk eisini at kenna.

Sum ferðslan øktist og tyngdist fór eisini at merkjast í grannalagnum, at undirlendið var ikki nóg trygt. Fóru stór og tung akfør eftir vegnum, risti og skalv alt í námind. Húsini góvu seg sum av jarðskjálvta, og tað hendi seg eisini, at flísar og annað slíkt tilfar klovnaði.

Nú asfalterast skuldi av nýggjum, skuldi gamalt asfalt takast oman av, áðrenn nýtt lag varð lagt.

Komið varð sjálvandi eftir, at tað fór ikki at bera til. Vegurin fór stutt sagt ikki at halda. Tí varð valt at grava allan vegin upp og fylla grót undir aftur.

Hetta arbeiðið er ikki við í upprunaligu kostnaðarmetingini hjá kommununi. Hetta fer helst at kosta Sandavágs Kommunu einar 300.000,- krónur eyka, verður mett av kommunuskrivstovuni í Sandavági.

Men hildið varð neyðugt at gera hetta, sum nú verður gjørt. Arbeiðið gongur væl, verður sagt av kommunuskrivstovuni, og væntandi verður tað liðugt um einar fjúrtan dagar ella so.

Sandavágs Kommuna arbeiðir við eini útstykkingarætlan norðuri í Niðaru Sørpum, teir kalla. Tað er økið norðan fyri viðalundina oman móti ánni.

Pláss verður fyri 22 grundstykkjum í hesi útstykkingini. Sagt verður, at áhugi er fyri hesi útstykkingini, og at onkur hevur biðið um grundstykki, meðan fleiri hava spurt seg fyri.

Ætlanin er ikki rættiliga klár enn, tí eigaraviðurskiftini ikki eru komin heilt upp á pláss. Men loyvi er fingið frá landsmyndugleikunum til útstykkingina, verður sagt av skrivstovuni hjá Sandavágs Kommunu.

# Hydro sleppur Sagexfólkum



JAN MÜLLER

Málið um teir tríggjar Sagex-verkfrøðingarnar, sum herfyri fingu fútaforboð at arbeiða í føroyskum øki fyri Føroya Kolvetni, hevur nú fingið ein enda. Síðani at Sagexfólkini vunnu frísak í Lagmandsretten, sum harvið ógildaði fútaforboðið frá undirrættinum, hevur Norsk Hydro biðið kærunevndina um at fáa málið til Hægstarætt. Nú fræ ttist so, at Norsk Hydro hevur broytt støðu og hevur gjørt av heilt at sleppa málinum. Tað ger ikki meira við tað. Tvs. at fríkenningin hjá Lagmansretten av teimum trimum ráðgevunum hjá Føroya Kolvetni verður endalig.

Ein orsøkin til at norska oljufelagið hevur slept málinum skal vera, at nú Norsk Hydro ikki hevur fingið nakað leitiloyvi í Føroyum, og tí hevur tað heldur onga orsøk til at halda fram málinum um teir tríggjar fyrrv. Sagamenninar.

Sambært Nettavisen í vikuni arbeiða Sagexfólkini nú við at leggja endurgjaldskrav móti Hydro fyri seinkan og tap í teirra arbeiði.

Sambært Nettavisen sigur keldur, at kompromisleysa støðan til teir tríggjar ráðgevararnar hjá føroyska oljufelagnum var ein av teimum mest týðandi orsøkunum til, at Norsk Hydro ikki fekk loyvi at leita eftir olju og gassi á landgrunninum. Hetta verður víst aftur av oljumálastýrinum skrivar norska blaðið.

# Allar fimm sonatur Beethovens

*Sunnudagin verða allar fimm cellokonsertirnar hjá Beethoven framførdar í Norðurlandahúsinum*

Konsertfelagið og Norðurlandahúsið kunnu sunnudagin bjóða øllum sum beundra Beethoven eitt serligt upplivilsi. Úr íslandi koma tveir tónleikarar, sum spæla allar cellosonatur Beethovens fimm í tali út í eitt komandi sunnudag kl 16:00 í Norðurlandahúsinum. Effektiva spælitíðin er út ímóti tveimum tímum, tí eru tveir steðgir á konsertini.

Tónleikararnir eru Sigurður Halldórsson, celloleikari, og Daniel Thorsteinsson, klaverleikari. Hesir báðir hava spælt saman síðan 1983 og hava hildið eina fjøld av konsertum víða hvar í Íslandi og uttanlands.

Sum limir í kamarorkestrinum »Kaput« hava teir spælt í Føroyum í smb. við summartónar.



Sigurður lærdi í Íslandi hjá navnframa Gunnari Kvaran og síðani hjá Raphael Sommer á Guildhall School of Music and Drama í London. Sigurður er ikki bert aktivur tónleikari í Íslandi og víða hvar í Europa, har hann heldur konsertir. Hann syngur eisini miðaldarsang í manskórinum, Voces Thules, og spælir suitur Bachs á barokkcello.

Daniel er frá Neskaupstaði. Hann lærdi klaverspæl í Reykjavík og síðani á Sweelinck konservatoriinum í Amsterdam. Eisini hann hevur spælt víða hvar í Europa, Amerika og Canada.

Áhugamál hansara í ymsum tónleikagernrum hava leitt til, at hann eisini spælir léttan tónleik bæði á klaver og harmoniku.

Nýliga var hann solistur ED triðju klaverkonsert Beethovens.

Tað kann tykjast ein stórur biti at svølgja allar fimm sonatur Beethovens á eini konsert, men hetta er ikki óvanligt uttanlands. Og sum eitt kuriosum kann nevnast, at Thorshavn Sang- og Musikkforening skipaði fyri slíkum drúgvum konsertum fyri góðum hundrað árum síðani, har steðgirniar vóru so mikið langir, at fólk kundu fara heim at fáa sær ein drekkamunn.

Tað verður ikki neyðugt sunnudagin, tí Norðurlandahúsið hevur okkurt gott at bjóða uppá í steðgunum.


# Thunderbird Telda



Thunderbird Gold 750MHz
128MB RAM PC-133
15.3GB harðdisk, 7200RPM, 2MB
Geforce skermkort 32MB / 17" litskerm
10x DVD ROM / 40x CD-ROM
ljóðkort / 90W hátalarasett
56K modem / knappaborð / mús
Windows 98
+ 1 DVD film - eftir egnum vali!

**einans kr. 15.599,-**

Prísurin er íroknað MVG. Fígging kann útvegast.

SpF Teldu Tænastan
Staravegur 5 - Telefon 317620 - Heimasíða www.tt.fo